## NBA setti áskoðaramet

Talan var um metstóra áskoðarafjøld, tá East og West hittust í árliga showdystinum í NBA um vikuskiftið. Dysturin varð hesa ferð spældur á Cowboys Stadion í Dallas, og ikki færri enn 108.713 áskoðarar vóru til dystin, sum East rættiliga óvæntað vann 141-139. – Vit ætlaðu, at tað skuldi verða ein fest, og tað gjørdist tað eisini, sigur David Cuban hjá Dallas Mavericks, sum saman við Dallas Cowboys stóð fyri dystinum.



## Vidic til Real Madrid

Sambart Dailymail eru Real Madrid vísur í, at teir hava vunnið kappingina við millum annað Barcelona, Milan og Inter um at keypa sterka verjuleikararin. Tað hevur verið frammi fyrr, at Vidic og familjan ikki trívast í Manchester. Samanspælið millum Vidic og Sir Alex Ferguson sigst heldur ikki vera gott, og tí eru teir komnir ásamt um, at Vidic skal skifta felag. Manchester United keypti Vidic úr Spartak Moscow fyri £7 milliónir í januar 2006. Vidic er serbiskur landsliðsleikarari og tí er møguleiki fyri, at hann verður at síggja í Føroyum, tí Føroyar eru í bólki saman við Serbia í undankappingini til EM 2012.

# Strævnari enn væntað

**Annika Ljósstein helt, at royndirnar vórðu avgerandi í finaluni, hóast VÍF gav favorittunum ein skarpari gang, enn tær sjálvar høvdu roknað við**




Jákup Mørk

Annika Ljósstein hjá Stjørnuni fegnaðist sjálvandi um sigurin leygardagin, men fyrst og fremst vildi hon geva rósus til mótstøðuna, sum hevði givið Stjørnuni ein nógv harðari dyst, enn klaksvíkarkvinnurnar sjálvar høvdu roknað við.

– Hetta gjørdist nógv strævnari, enn vit høvdu væntað. VÍF stríddist veruliga væl allan dystin, og hetta var ein virkeliga stuttligur dystur at spæla. Tær vóru alvorliga underdogs undan dystinum, men tær tóku sín møguleika. Og hóast úrslitið sigur, at vit vunnu, so stýri VÍF stóran part av dystinum. Hjá okkum kendist tað í øllum førum ikki, sum vóru vit serliga vísar í sigrinum.



Ein av avgerandi løtunum í dystinum var, tá Annika varð sett á høgra bakk í verjuni hjá Stjørnuni

Mynd: Álvur Haraldsen

Finalan varð avgjørd beint undan og eftirs steðgin. Hvat var tað, sum gjørdi munin hesa løtuna?

– Eg rokni við, at tað vóru royndirnar hjá okkum, sum gjørdu tað. Vit megnaðu at vinna yvirtakið hesa løtuna, og so var kravið, at vit skuldu avgera dystin. Og tað dugdu vit so eisini, segði Annika Ljósstein.

# Gult kort til Kappingarnevndina

**Seinføra viðgerðin av leikbanninum til Ára Dam er nakað, sum als ikki eigur at koma fyri í føroyskum hondbólti**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt leikbann, sum verður útskrivað bara tvey lítil samdøgur undan einum tí mest týðandi dystinum á árinum.

Hetta var veruleikin, sum Neistin mátti fyrihalda seg til, tá teir hósdagin høvdu lagt seinastu hond á sínar fyrireikingar til steypafinaluna.

Venjarin hjá Neistanum staðfesti eftir hetta, at Kappingarnevndin hevði sýnt serstakliga lítla virðing fyri fyrireikingunum hjá Neistanum til finaluna, og frá hesum reglum skal ljóða, at talan er um mannagongd, sum als ikki kann góðtakast á nakran sum helst hátt.

Umberingin um, at limur í Kappingarnevndini var burturstaddur, er snøgt sagt ikki haldbær. Limirnir vistu, at eitt mál um leikbann bíðaði eftir viðgerð, og talan var neyvan um mál, sum kravdi somikið drúgva viðgerð, at hetta ikki lat seg gera umvegis ein telefonfund.

Heilt einfalt var málið, at Neista-málverjin fekk beinleiðis reytt fyri at steðga fríum mótstøðuspælara. Forskriftirnar siga eftir øllum at døma, at hetta skal geva tveir dagar, og so er bara at avgreiða málið. Ein stempul-avgreiðsla, sum átti at verið framd í minsta lagi eina viku fyrr, enn hon endaði við at verða viðgjørd.

Vónandi hevur HSF lært somikið av hendingini, at hetta er ein støða, ið ongan tíð kemur fyri aftur. Um veruleikin so var, at hetta kanska hjálpti Neistanum, tá Emil Kulmann Jacobsen stóð ein góðan dyst, er ein onnur søga. Men tað linkar ikki gula kortið til FSF.

# Altíð feitt at vinna



**Stóri málverjin hjá Neistanum fegnaðist um sigurin, sum hann helt var væl og virðiliga uppiborin**




Jákup Mørk

Eitt av stóru samrøðuevnunum í upptaktini til mansfinaluna var styrkurin, sum Neistin hevði fingið sær í málinum.

Emil Kulmann Jacobsen var kanska bara ætlaður sum gardering fyri Ára Dam, men tá hesin fekk leikbann, stóð stóri danin størsta partin av finaluni, og tað gjørdi hann eisini framúr væl. Og smílið var sjálvandi stórt, tá finalan var av og steypaheitið heima.

– Tað er sjálvandi altíð feitt at vinna. Umstøðurnar vóru fínar, stemningurin var framúr og áskoðararnir bakkaðu okkum sera væl upp. Kanska var hondbólturin ikki tann allarvakrasti, men vit vinna og so er alt jú deiligt, staðfesti Emil Kulmann Jacobsen.

– Munarin var helst, at vit vóru betur fyri kropsliga. Vit vinna eina leiðslu tíðliga í dystinum, og tí mugu teir alla tíðina stríðast nakað eyka. Og tíbetur megna vit so alla tíðina at halda teimum, segði Emil K. Jacobsen.

Eingin ivi er um, at styrkurin í stóra dananum kom væl við. Og í besta Lindgreen-stíli hoydust áskoðararnir rópa: Eeeemiiil, tá bjargingar blivu framdar. Men hóast hann hevur havt tað fínt hesar báðar vikurnar í Føroyum, so staðfesti Emil Kulmann Jacobsen at enda, at leiðin nú gekk aftur til Danmarkar.